FKF jour: 113_1

FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ

Føroya kommunufelag
Frammi í Gerði 1
340 Kvívík

Argir, tann 03. oktober 2010
J.Nr.: 3000-0044/2009 / 14
(at tilskila í svari)

Viðgjørt: TP

Tygara skriv:

08 OKT. 2010

Hjálagt eru uppskot til hoyringar um endurrindan av MVG-útreiðslum hjá kommunum og serstøkum lutaíbúarfeløgum

Galdandi kunngerð um meirvirðisgjald til kommunur v.m. skal ætlandi setast úr gildi, og ístaðin koma tvær kunngerðir; ein um MVG-endurrindan til kommunur og ein til serstøk lutaíbúðarfeløg. Orsøkin til uppbýti er, at regulverkið hjá kommunum og serstøkum lutaíbúðarfeløgum er rættuliga ymiskt.

Harumframt er ætlanin, at umleggja útgjaldið av meirvirðisgjaldinum til kommunur til at fylgja mánaðarligu roknskaparinnlatingunum. Á hendan hátt fæst betur skráseting fyri hvat verður goldið út fyri, ið serliga er ein fyrimunur fyri bókhaldsskrásetingarnar hjá landinum. Fyri kommunurnar merkir broytingin ikki tað stóra, einamest at ístaðin fyri at søkja um MVG-afturbering, so góðkennir kommunan heldur, at innlatni tíðarskeiðsroknskapurin er rættur, og harvið at MVG-endurberingin fyri tíðarskeiðið er rætt.

Kommunur, sum ikki hava lagt um roknskap (t.e. tær við færri enn 400 íbúgvum og nakrir felagskommunalir stovnar), skulu enn søkja um mvg-endurrindan frá TAKS kvarttalsliga. Rindan/endurrindan av vinnuligum meirvirðisgjaldi heldur fram óbroytt og fer fram eftir somu reglum, sum TAKS ásetur til vinnufyritøkur.

Hoyringsfreistin er ásett til mánadagin 25. oktober 2010.

Vegna Fíggjarmálaráðið

Terji Petersen

Terji Petersen, ráðgevi

KVÍGGJARTÚN 1 • POSTSMOGA 2039 • FO-165 ARGIR
TELEFON: + 298 35 20 20 • TELEFAX: + 298 35 20 25 • E-MAIL: FMR@FMR.FO

(Uppskot til)
Kunngerð
um
endurrindan av meirvirðisgjaldi til kommunur v.m.

§ 1. Henda kunngerð fevnir um kommunur, kommunal virkir og stovnar.
Stk. 2. Kommunur, kommunal virkir og stovnar skulu rinda meirvirðisgjald til landskassan av virksemi sínum samsvarandi galdandi reglum í løgtingslóg um meirvirðisgjald.

§ 2. Meirvirðisgjald verður afturgoldið til kommunur og kommunal virkir og stovnar við 75% av inngangandi meirvirðisgjaldi teirra.

§ 3. Bókhaldið hjá kommunum skal lúka krøvini í kap. 8 í løgtingslóg um meirvirðisgjald. Bókhaldið hjá kommunum skal lúka krøvini í kunngerð um roknskaparverk kommunanna o.til.

§ 4. Meirvirðisgjaldið verður endurrindað samsvarandi tíðarskeiðsroknskapunum, ið kommunur sambært kunngerð um roknskaparverk kommunanna o.til. lata Føroya Gjaldstovu.
Stk. 2. Fyri kommunur, ið hava fingið undantak at lata inn tíðarskeiðsroknskapir sbrt. kunngerð um roknskaparverk kommunanna o.til., verður meirvirðisgjald endurrindað eftir umsókn. TAKS útflýggjar umsóknarbløð at nýta viðvíkjandi endurrindanini.

§ 5. Fyri kommunur er avgjaldstíðarskeiðið samsvarandi tíðarskeiðsroknskapunum, og tíðarfreistin at lata inn uppgerðina er 1 mánað eftir lokið tíðarskeið samsvarandi § 10 stk. 6 í kunngerð um roknskaparverk kommunanna o.til.
Stk. 2. Fyri kommunur, ið hava fingið undantak at lata inn tíðarskeiðsroknskapir sbrt. kunngerð um roknskaparverk kommunanna o.til. er tíðarfreistin at lata inn uppgerðina ávikavist avgjaldstíðarskeiðið samsvarandi § 20, stk. 1 og 2 í løgtingslóg um meirvirðisgjald.
Stk. 3. Útgjalding fer fram umvegis kommunuavrokningina hjá Føroya Gjaldstova. Útgjaldingin fer fram í avrokningini fyri tann mánaðin, tá latni tíðarskeiðsroknskapurin er skrásettur. Kann Føroya Gjaldstova ávikavist TAKS vegna viðurskiftini hjá einari kommunu ikki hava eftirlit við uppgerðini, verður útgjaldingarfreistin avbrotin, til viðurskiftini hjá kommununi ikki forða fyri eftirliti.
Stk. 4. Kommunan skal lata Føroya Gjaldstovu váttan um, at endurrindaða meirvirðisgjaldið er rætt og í samsvar við bókhaldið hjá kommununi. Um váttanin ikki er Føroya Gjaldstovu í hendi seinast tveir mánaðir eftir at viðkomandi tíðarskeið er endað, steðgar Føroya Gjaldstova ávikavist TAKS við at rinda út endurrindan fyri meirvirðisgjald til nøktandi váttan er fingin.

§ 6. Endurgjaldið kann ikki vera hægri enn 75% av tí goldna meirvirðisgjaldinum. Er ivi um støddina á upphæddini ella um, hvussu komið er fram til upphæddina, sum skal endurgjaldast, kann Føroya Gjaldstova ávikavist TAKS gera eina metta áseting av upphæddini.
Stk. 2. Avgerðin hjá Føroya Gjaldstova

ávikavist TAKS kann kærast til Skatta- og Avgjaldskærunevndina.

§ 7. Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2011. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 110 frá 31. august 2009 um meirvirðisgjald hjá kommunum v.m.

Fíggjarmálaráðið, tann xx. oktober 2010

Jóannes Eidesgaard
landsstýrismaður

/Petur Alberg Lamhauge

(Uppskot til)
Kunngerð
um
meirvirðisgjald hjá serstøkum lutaíbúðafeløgum

§ 1. Henda kunngerð fevnir um serstøk lutaíbúðafeløg, sbr. kap. 3 í løgtingslóg um lutaíbúðafeløg.
Stk. 2. Serstøk lutaíbúðafeløg skulu rinda meirvirðisgjald til landskassan av virksemi sínum samsvarandi galdandi reglum í løgtingslóg um meirvirðisgjald.

§ 2. Meirvirðisgjald verður afturgoldið til serstøk lutaíbúðafeløg við 75% av inngangandi meirvirðisgjaldi teirra.

§ 3. Bókhaldið hjá serstøkum lutaíbúðafeløgum skal lúka krøvini í kap. 8 í løgtingslóg um meirvirðisgjald og kunngerð um minstukrøv til bókhald og roknskap.

§ 4. Meirvirðisgjaldið verður endurrindað eftir umsókn, sum verður send TAKS. TAKS útflýggjar umsóknarbløð at nýta viðvíkjandi endurrindanini.

§ 5. Fyri serstøk lutaíbúðafeløg er tíðarfreistin at lata inn uppgerðina ávikavist avgjaldstíðarskeiðið samsvarandi § 20, stk. 1 og 2 í løgtingslóg um meirvirðisgjald.
Stk. 2. Er uppgerðin saman við umsókn rættstundis móttikin, fer útgjaldingin fram í seinasta lagi 3 vikur eftir, at avgjaldsuppgerðin fyri viðkomandi tíðarskeið er móttikin. Kann TAKS vegna viðurskiftini hjá einum serstøkum lutaíbúðafelag ikki hava eftirlit við uppgerðini, verður útgjaldingarfreistin avbrotin, til viðurskiftini hjá serstaka lutaíbúðafelagnum ikki forða fyri eftirliti.

§ 6. Endurgjaldið kann ikki vera hægri enn 75% av tí goldna meirvirðisgjaldinum. Er ivi um støddina á upphæddini ella um, hvussu komið er fram til upphæddina, sum skal endurgjaldast, kann TAKS gera eina metta áseting av upphæddini.
Stk. 2. Avgerðin hjá TAKS kann kærast til Skatta- og Avgjaldskærunevndina.

§ 7. Henda kunngerð kemur í gildi 1. januar 2011. Samstundis fer úr gildi kunngerð nr. 110 frá 31. august 2009 um meirvirðisgjald hjá kommunum v.m.

Fíggjarmálaráðið, tann xx. september 2010

Jóannes Eidesgaard
Landsstýrismaður

/Petur Alberg Lamhauge